# Pro et Contra

Eitt nýtt lestrarár er um at byrja á einum av heimsins minstu lærdu háskúlum. Her ber til at nema sær útbúgvingar, ið standa altjóða mát og hóast avmarkingar í ítøkiligum vavi, víðka vit um møguleikarnar og í ár bjóða vit til upptøku á øllum deildum samstundis.
Deildirnar eru tríggjar og til ber at velja millum fleiri ymiskar bachelor- ella masterútbúgvingar:

**Náttúruvísindadeildin:**
B.Sc. í lívfrøði

**Føroyamálsdeildin:**
B.A. í føroyskum
M.A. í føroyskum

**Søgu- og samfelagsdeildin:**
B.A. í søgu
B.S.Sc. í stjórnmálafrøði

Til tann, ið ivast í at fara undir hægri lestur, hava vit sett upp nakrar hugsaðar fyrimunir og vansar við at velja Fróðskaparsetur Føroya ella at fara uttanlands at lesa. Vónandi kunnu hesir gera støðutakanina léttari.

| Fróðskaparsetur Føroya | Uttanlands |
|---|---|
| Umhvørvið er kent | Umhvørvið er ókent |
| Gott samband við undirvísarar | Lítið og einki samband við undirvísarar |
| Næstan alt fer fram á føroyskum máli | Undirvísingin fer fram á lokalum/enskum máli |
| Tú fært gott innlit í føroysk samfelagsviðurskifti | Ringt at fáa innlit í hvussu samfelagið virkar og fjarstøðan millum samfelagstættir og fólk er stór |
| Einasta universitet, ið burturav granskar í føroyskum viðurskiftum | - |
| Lætt at sleppa við í norðurlendskar skiftisætlanir sum t.d. Nordplus | Uttanlands fært tú ongar sersømdir. Tú ert ein millum túsundtals lesandi |
| Ikki góð bústaðarviðurskifti | Góðir bústaðarmøguleikar |
| Lágur studningur | Góðir studningsmøguleikar, ÚSUN |
| Nýggj føroysk vinfólk | Nýggj útlendsk vinfólk |
| Lokalt lestrarumhvørvi | Útisetalív í fremmandum býum og londum |
| Vánalig hølisviðurskifti | Í flestu førum nýmótans høli og hentleikar |
| Ótrygg fíggjarviðurskifti á stovninum | Tann lesandi merkir einki til slíkt uttanlands |
| Netverk og samstarv við myndugleikar og vinnulív | Avmarkað netverk og avmarkað samstarv |
| Kanska ikki so 'cool' at lesa á Fróðskaparsetri Føroya | Harvard, Yale, Princeton! |
| Stór dunna í lítlum hyli | Lítil dunna í stórum hyli |

Tað er eingin loyna, at vit ikki kunnu bjóða glæsiligar samkomuhallir. Tað er heldur ikki nakað dulsmál, at millum tey lesandi á Fróðskaparsetri Føroya neyvan sita komandi monarkar og forsetar eins og á Harvard og Princeton.
Hinvegin klekja vit heimsborgarar. Aldargomlu lærdu háskúlarnir í Cambridge og Sorbonne eru neyvan ernir av, at Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða útbúgvingar á sama fakliga stigi sum teir. Fróðskaparsetur Føroya er í roynd og veru ein staðfesting av, at flestu avmarkingarnar verða til í høvdinum á fólki. Í so máta hava vit als ikki plásstrot.

Umsóknarfreistin er 1. juli 2006

Neyvari lýsingar av útbúgvingum og møguleikum síggjast á www.setur.fo.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
J.C. SVABOS GØTU 14 • FO-100 TÓRSHAVN • TEL.: +298 352500 • FAKS: +298 352501
WWW.SETUR.FO

TEAM85